## TIT SPYRJA VIT SVARA


*Bergur Hanusson, djóralækni*


*Heri Joensen, prestur*


*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*


*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*


*Jens Andreassen, lækni*


*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*


*Jón Klein Olsen, politistur*


*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*


*Julianna Næs, pedagogur*


*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*


*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*


*Marius Staksberg, málfrøðingur*

MÁLFRØÐINGURIN

### Gentunavnið Rannvá

Kann málfrøðingurin siga mær eitt sindur um gentunavnið *Rannvá*, hvat merkir tað, og hvaðani stavar tað? Er tað eisini til í øðrum málum?

Rannvá *kemur av norrøna kvinnunavninum* Rannveig. *Fyrri liður er helst norrøna orðið* rann *'hús', sum vit eisini hava í føroyskum kvæðamáli, eitt nú í* Ólavi riddararós:

*Ólavur ríður eftir*
*bjørgunum fram,*
*fann hann upp á eitt*
*álvarann.*

*har* álvarann *merkir 'álvahús' ella 'álvabústaður'. Orðið* rann *er eisini fyrri liður í sagnorðinum* rannsaka.

*Onkur hevur kortini sett* rann *í samband við* ragn, *sum er fyrri liður í nøvnum sum* Ragnar *og* Ragnhild. *Tað er ógreitt, hvat* ragn *merkir, men tað hevur verið sett í samband við norrønt* regin *'gudar, guddómar', men sum navnaliður verður tað hildið at vera skylt við gotiska orðið* ragin *'ráð, avgerð', og er sostatt samgermanskt.*

*Tað er heldur ikki semja um, hvør upprunin til seinna lið,* veig, *er. Tað kann vera norrønt veig 'styrki', sum eisini kann merkja 'kvinna', men onkur hevur sett tað í samband við norrønt* víg *'stríð'. Í føroyskum er* veig *sum seinni liður í nøvnum viknað til* vá.

*Navnið finst í Íslandi og Noregi sum* Rannveig *og í Svøríki sum* Rannvi. *Í Føroyum hava vit bæði serføroyska sniðið* Rannvá *og samnorrøna sniðið* Rannveig.

LØGFRØÐINGURIN

### Hvussu nógv kenningalomb eigi eg

1. Hvørji rættindi hevur eigari av kenning til upplýsing um áseyð og lembing (lomb undan kenningaóm hjá sær sjálvum)?
2. Hvørja skyldu hevur røktingarmaðurin til at upplýsa um rætt?
3. Hvørjar avleiðingar fær tað, um eigarin ikki fær ta úrtøku (kenningalomb), sum hann hevur fingið upplýst eru hansara?

Eg meti grein 11 í lóg nr. 172 frá 18. mai um " Haugers Styrelse og Drift" svarar spurningunum 1 og 2, nevniliga soljóðandi.

Grein 11. Haugerøgterne er i deres Tjeneste Ejerne ansvarlige og skal rette sig efter de Forskriftir, som gives af Haugestevnet og Haugens Bestyrelse. De skal paa den enkelte Ejers eller Brugers Forlangende meddele ham Forklaring om de dem betroede Faars Antal og Tilstand samt Røgt i Haugen m.m.

Triði spurningur krevur eina frágreiðing, tá hann ikki kann svarast uttan at vita, hvat fram er farið. Eg eri eigari av 10 kenningaóm. Á várgongu spurdi eg røktingarmannin, hvussu lambað var hjá mær. Hann segði, at tann eina ærin hevði ikki lamb, og at eg átti 9 kenningalomb. Tá so heystfjøllini verða gingin, verður tillutað mær 7 kenningarlomb, og spyrji eg fleiri ferðir, eftir at heystfjøllini eru gingin, um tey tvey írestandi kenningalombini, sum eg ikki havi fingið, men fái bert at vita, at tøkuseyður framvegis gongur í haganum. Merkir hetta, at eg nú eigi 12 kenningalomb í haganum? Og komandi ár kann krevja úrtøku av 12 óm? Sjálvt um eg ikki havi rætt til meiri enn 10 kenningaær, ella skal hagin endurgjalda mær tey írestandi kenningalombini, sum helst eru komin uppí býti hjá felagnum, sum eg eisini eru eigari í.

Havi eg rætt til at krevja úrtøku, sum mær er upplýst er mín, nevniliga 9 kenningalomb? sum vóru til várgongu. Eisini má eigari kunna krevja, at hann kann halda seg til teir upplýsingar, hann hevur fingið, um onnur boð ikki eru givin?

*Spurningi 1 og 2 meti eg, at tygum svara sjálvur og er tí ikki neyðugt hjá mær at gera víðari viðmerkingar til teir.*

*Viðv. spurningi 3, so er bert loyvi til at hava kenningaseyð um so er at hagastevna hevur viðtikið hetta. Slík viðtøka skal eisini áseta, at kenningaseyður skal hava eitt sermerki, ið skal góðkennast av sýslumanninum. Røktingarmaðurin hevur til uppgávu at skipa fyri, at seyðurin verður merktur.*

*Um so er, at upplýsingarnir hjá røktingarmanninum til tygum undir várgonguni eru rættir, so eru 2 kenningarlomb burturblivin. Út frá teimun upplýsingum tygum geva, er ikki møguligt at staðfesta, hvat er blivið av teimun burturblivnu kenningalombunum. Orsakað av hesum, og vísandi til, at eg ikki meti tað fyriliggja upplýsingar sum vísa, at røktingarmaðurin hevur misrøkt sínar skyldur, vil eg meta, at tygum ikki kunnu gera meira við málið.*

*Vísandi til frammanfyri standandi vil undirritaði tí ikki meta, at tygum kunna krevja úrtøku av 12 óm ella at hagin og/ella røktingarmaðurin hava skyldu at veita tygum úrtøku av ella endurgjald fyri tey burturblivnu kenningalombini.*

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

### Høvuðsstaðurin ferðslutryggari

Marknagilsvegurin er nú loksins liðugtgjørdur og bundin í restina av ringvegnum um Havnina. Heldur Ferðslutrygd, at hesin vegur fer at minka um ferðsluskaðar í býnum, ella fer hann kanska tvørturímóti at skapa møguleikar fyri rasarakoyring og harvið enn fleiri skaðum?

*Um vit taka Marknagilsvegin, sum hann var, áðrenn nýggju vegagerðina, so var hann so smalur, at tveir bilar ikki kundu møtast, uttan við víkipláss. At vegur er smalur, er í sjálvum sær ikki lívshættisligt, um vit bara hugsa um bilarnar, tí á smølum vegi ber av góðum orsøkum ikki til at koyra skjótari enn eitt vist. Og í veruleikanum er tað júst tað, sum verður gjørt við nýggjar vegir, tá ið ynskt verður, at ferðin ikki skal vera ov nógv. Tá verður vegurin t.d. við oyggjum ella øðrum forðingum smalkaður, so at bilførararnir verða noyddir at seta ferðina niður. Men tað er ikki bara bilferðsla á Marknagilsvegnum, har er eisini rættiliga nógv fólk til gongu og helst eisini á súkklu. Og hetta var rættiliga vandamikið, tí fólk høvdu ikki annað val, enn at fara út á sjálvum vegin, og harvið seta seg í vanda fyri at verða ákoyrd. Hetta var ein ótolandi støða hjá øllum, sum skuldu nýta henda veg. Harumframt var eitt áhaldandi trýst á vegin, tí at stórur partur av eystur-vestur ferðsluni í Havnini leitaði sær eftir Marknagilsvegnum fyri at sleppa undan bíðirøðunum niðri í býnum. Avgerðin um at gera nakað við henda veg, kann tí ikki annað enn sigast at hava verið sjálvsøgd.*

*Nú Marknagilsvegurin er liðugur er at fegnast um, at vit hava ein góðan ringveg rundan um Havnina, við gongubreytum í báðum síðum. Hóast allir trupulleikar ikki eru loystir, t.d. súkkluviðurskiftini, mugu vit geva myndugleikunum tað rós, at teir veruliga hava sýnt vilja at gera ferðsluna tryggari. At tað nú ber til at ferðast eystur og vestur í Havnini eftir ringvegnum, hevur uttan iva lætt um trýstið á ferðsluni í miðbýnum og vónandi tí gjørt viðurskiftini eitt sindur ferðslutryggari har.*

*Eftir stendur so spurningurin um henda nýgerðin av Marknagilsvegnum skapar møguleikar fyri rasarakoyring?*

*Í útgangsstøðinum kann verða sagt, at vegir eiga verða gjørdir til ta ferðslu, sum ætlanin er at hava á teimum. Tað er í øllum førum ikki skilagott at gera breiðar og beinar vegir, har ætlanin er, at ferðin skal vera lág. Tí, tað er ein sannroynd, at slíkir vegir elva til, at tað verður koyrt skjótt. Sigast má, at hetta hevur, í ávísan mun, verið havt í huga, tá ið Marknagilsvegurin er gjørdur, og tí eru í støðum t.d. oyggjar gjørdar at smalka vegin. Spurningurin um loysnirnar, sum eru gjørdar, eru optimalar, skal tó standa ósvaraður fyri fyrst.*

*Tá ið hetta er sagt, má sjálvsagt verða lagt afturat, at tað skal eitt menniskja til at traðka á spitaran og sæð í tí ljósi, finst eingin umbering fyri at koyra skjótari enn loyvt - ella ráðiligt er.*

### Spyrjið serfrøðingarnar

Hava tit spurningar til serfrøðingarnar, kunnu tit senda teir til:

**Sosialin**
postsmogu 76
110 Tórshavn

ella á fax: 314720
og teldupostadressuna:
spyr@sosialurin.fo


*Nýggi Marknagilsvegurin*



# Upplýsa um lestur uttanfyri Norðurlond

**Altjóða skrivstovan lat alment upp í seinastu viku. Høvuðsuppgávan hjá hesi skrivstovu er at upplýsa um møguleikarnar hjá føroyingum at útbúgva seg uttanfyri Norðurlond**

ÚTBÚGVING
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin í seinastu viku var almenn móttøka í J.C. Svabosgøtu 14 ella gróthúsinum á Debesartrøð. Skipað var fyri móttøku í sambandi við, at Altjóða Skrivstovan alment lat upp, og at Setursskrivstovan eisini flutti inn á hesi hølini. Hesar báðar skrivstovur skulu sostatt búleikast undir somu lon í komandi tíðum.

Holger Arnbjerg er leiðari av Altjóða Skrivstovuni, og hann er longu farin til verka at upplýsa ungdómar um teirra møguleikar at fara undir hægri lesnað øðrum londum enn Norðurlondum.

Høvuðsuppgávan hjá skrivstovuni er at vegleiða og upplýsa um útbúgvingarmøguleikar og útbúgvingarskipanir uttanfyri Danmark.


*Holger Arnbjerg skal hava høvuðsábyrgdina av Altjóða Skrivstovuni, og hann sigur, at hansara høvuðsuppgáva er at hjálpa ungum, sum ætla sær undir hægri lesnað aðrastaðni enn í Danmark*

– Okkara høvuðsuppgáva er at eggja ungum, sum ætla sær undir hægri lesnað, at royna lærustovnar uttan fyri Norðurlond. Eisini skulu vit royna at skipa fyri næmingaskiftum millum hægri lærustovnar, sigur Holger Arnbjerg.

Holger sigur, at ein heimasíða skjótt verður klár, men enn er hon ikki atkomilig á internetinum. Stórt arbeiði fer eisini at vera lagt í at gera skrivstovuna sjónliga millum tey ungu á miðnámsskúlum og aðrastaðni.

– Tey, sum ætla sær at lesa aðrastaðni, hava ofta nógvar forðingar at sleppa framvið, áðrenn klárt er at fara undir sjálvan lesturin Tað eru hesar forðingar, sum eg skal hjálpa fólki at sleppa uttanum, sigur Holger Arnbjerg.

Holger sigur, at enn er skrivstovan bara á byrjunarstigi, og tí má hann prioritera her í byrjanini, hvat hann fer at leggja størts dent á.

Holger sigur seg hava ein varhuga av, at tað eru nógv, sum hava hug at lesa aðrastaðni enn í Føroyum og Danmark. Í einari kanning á einum av miðnámsskúlunum segði ein triðingur av næmingunum, at teir heldur vildu lesa uttanfyri Norðurlond.

# Oddfríður leggur lag á

**Næstu fýra mánaðirnar verður skeið fyri rithøvundar á Háskúlanum í Havn, og tað verður Oddfríður Marni Rasmussen, sum fer at leggja teimum skrivandi lag á**

SKEIÐ
*Stefan í Skorini*

Í kvøld, mikukvøldið, verður fyrsta skriviskeiðið á Háskúlanum í Havn, kallað LivaSkriva, sum Háskúlin fyrr hevur skipað fyri. Oddfríður Marni, sum herfyri vann bókmentavirðisløn M.A. Jakobsens, hevur eisini fyrr roynt at skipa fyri slíkum skeiðum í Føroyum.

Oddfríður Marni sigur, at dentur fer at verða lagdur á stuttsøgur og stuttprosa á skeiðnum, har skeiðluttakararnir skulu læra at býta tekstir upp í tær ymisku bókmentagreinirnar.

Annar høvuðstátturin á skeiðnum verður, at skeiðluttakararnir skulu læra, hvussu rithøvundurin skapar ein persón í eini stuttsøgu, og síðani skulu teir skriva eina stuttsøgu um henda persónin, sum teir sjálvir skapa.


*Oddfríður Marni Rasmussen fer næstu mánaðirnar at leggja rithøvundum, sum kanska ætla sær meira innan hetta yrkið, lag á*

Næmingarnir skulu eisini skriva sjálvir, so at teir fáa eitt sindur av venjing, og síðani skulu skeiðluttakararnir meta um arbeiðið hjá hinum á liðnum. Soleiðis fáa næmingarnir sítt egna verk undir luppin, og tað kann vera læruríkt.

Oddfríður Marni sigur, at hann fer at brúka tekstir bæði hjá kendum rithøvundum og hjá næmingunum sjálvum í undirvísingini. Hann fer at greina hesar hesar tekstir og søgur saman við næmingunum.

Skeiðið verður tríggjar tímar hvørt mikukvøld fram til 16. mai. Hetta er long tíð, men Oddfríður heldur ikki, at tað er ov langt tíðarskeið, men at næmingarnir fáa meira burturúr, tá tað er skipað soleiðis.

## Creamy onga konsert í Havn

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Creamy kanska fór at hava eina eykakonsert í Havn. Fyrireikararnir hava nú boðað frá, at henda konsertin undir ongum umstøðum verður hildin.

Tey, sum ikki hava ognað sær atgongumerki til konsertina inni í Runavík, sleppa sostatt ikki at síggja tær báðar genturnar á palli.

Fyrireikararnir siga, at fleiri enn 1500 atgongumerki longu eru seld til konsertina í Eysturoynni, so tað eru ikki nógv eftir.

Fyrireikararnir siga, at fleiri kanska bíða við at keypa atgongumerki, tí tey vænta, at ein konsert eisini verður í Havn, men henda verður nú av ongum.

## Ferðsluóhapp á Eiði

**Leygarnáttina rendi ein bilur við fimm ungum monnum á ein garð á Eiði. Allir vórðu fluttir á Landssjúkarahúsið í Havn, men eingin hevur fingið álvarsligt mein**

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Leygarnáttina kl. 03.52 fekk løgreglan fráboðan um eitt ferðsluóhapp á Eiði. Fimm ungir menn vóru í bilinum, og allir vóru fluttir við ambulansuni á sjúkrahúsið í Havn.

Tveir teirra vóru gjørdir somikið í stand, at teir kundu fara heimaftur, meðan hinir tríggir vórðu innlagdir.

Løgreglan heldur, at allir fimm vóru ávirkaðir av rúsdrekka, og tí vórðu blóðroyndir tiknar av øllum somlum.

Bilurin fór ógvuliga illa, tí hann rendi frontalt í betonggarðin. Bilurin koyrdi úteftir úr bygdini, og tað var ikki hált á vegnum, tá óhappið hendi.

## Trokan á heimasíðuni

**Eftir nógvu umtaluni av heimasíðuni, www.ung.as, var sannur stormur av vitjandi á síðuni hósdagin. Heili 1200 vitjanir vórðu skrásettar henda dagin**

HEIMASÍÐA
*Stefan í Skorini*

Heimasíðan hjá Peturi Hansen hevur sanniliga verið í brennideplinum seinastu dagarnar. Eftir at tíðindi bórust um, at løgreglan hevði sett seg í samband við dreingin, tí hon helt, at myndirnar á síðuni vóru heldur ivasamar, hevur síðan havt fleiri vitjanir enn vanligt.

Petur Hansen sigur, at vanliga eru eini 400 vitjanir hvønn dag, men hósdagin vóru vitjanirnar heili tríggjar ferðir fleiri enn vanligt. Skrásettar vórðu 1200 vitjanir hósdagin, meðan 800 vitjandi vóru fríggjadagin.

Petur leggur afturat, at teljarin á hansara síðu er meira nágreiniligur í teljingini enn aðrir teljarar, tí hesin skilur ímillum IP-adressurnar, sum aðrir vanliga ikki gera. Tí hava aðrir teljarar lyndi til at skráseta fleiri vijtanir, enn talan í veruleikanum er um.

Petur Hansen sigur, at tá hann var inni á Strondum um vikuskiftið og tók myndir á Prix Føroyar konsertini, vóru fólk eitt sindur meira afturhaldandi, enn hann er vanur við, tó fekk hann nakrar góðar myndir á konsertini. Annars hevur hann ikki merkt stórvegis til nógvu umtaluna.

– Eg havi fingið nakrar ábreiðslur frá tí eldra ættarliðnum, men eingin av teimum ungu hevur verið illur um myndirnar, sigur Petur.